# C21 koma til Føroyar



**Teir eru ungir, teir eru penir og syngja sum um teir vóru føddir til tað, teir eru C21 og annað vikuskiftið spæla teir í Høllini á Hálsi, hetta kann gerast tann allar seinasta konsertin hjá størsta danska Boy-Bandinum**

NÁTTIN ER UNG
*Niels Uni Dam*
nielsuni@sosialurin.fo

C21 er tað einasta danska Boy-Bandið, sum hevur megnað at selt nógvar fløgur í Danmark og nú kemur bólkurin til Føroyar. Dreingjabólkurin fer á Náttin er Ung tiltakinum í høllini á Hálsi leygarkvøldið 3. desember at spæla sínar vøkru kærleikssangir, ið hava givið bólkinum fleiri stór hitt í Danmark og selt so mikið væl, at bólkurin hevur fingið fleiri gullfløgur. Eisini hevur bólkurin verið nógv at hoyra uttanfyri Danmark

C21 er ikki, sum flestu tílíkir bólkar settir saman av einum plátufelagi, upprunaliga vóru tað tríggir vinmenn, sum funnu saman at syngja saman og skriva nøkur løg. Hetta merkir eisini bólkin í dag, teir skriva nógv av løgunum sjálvir, og á konsertum spæla limirnir sjálvir ljómborð og gittara. Men teir eru sum flestu Boy-Bands penir ungir menn.

### Kanska síðsta konsert

C21 hevur givið tvær fløgur út, í 2003 fløguna C21, ið hevði hittløgnini Stuck in My Heart og You Are The One, og í 2004 fløguna Listen, og av henni varð serliga lagið All that I want spælt nógv. Seinasta hálva árið hevur verið rættuliga hendingarríkt fyri C21. Ein av teimum trimum liminum Esben Duus er nýliga farin út bólkinum,. og hinir báðir limirnir David og Søren eru hildnir fram sum ein duo. Søren er harumframt farin undir ein yrkisleið sum sjónleikari og tí er framtíðin hjá C21 eitt sindur ivasom - Konsertin í Føroyum kann gerast tann síðsta hjá bólkinum..

### Fekk íblástur í biografinum

Elin í Stórustovu skipar saman við Margarinfabrikkini í Havn fyri Náttin er Ung. Tað er , sum hevur fingið C21 til Føroyar. Elin greiðir frá, at beint eftir, at hon hevði skipað fyri Nik & Jay konsertini fyri nøkrum árum síðan, tosaði hon nógv við C21 um at koma hendanvegin. Men tað gjørdist av ongum. Her fyri var Elin í biograf við børnunum hjá sær til "Far til Fire", har Søren spælir við. Tá Elin kom til hús, sá hon í Se & Hør, at bólkurin var farin í "Tænkeboks" um framtíðina hjá C21.

Hon setti seg beinanvegin í samband við umboðsmannin hjá bólkinum, og spurdi um teir enn spældu, og um teir kundu koma til Føroyar at spæla. Svarið varð ja, at bólkurin fegin vildi til Føroyar at spæla. Men síðan vóru teir um at avlýsa, men kundu so knappiliga alíkavæl, og í dag verður endaligi sáttmálin undirskrivaður.

### Riggar væl

Elin sigur, at eisini eitt annað útlendskt navn og tvey føroysk fara at spæla á Náttin er Ung, ið verður fyriskipað á øðrum sinni. Fyrra ferðin gekk ómetaliga væl, og tey nógvu ungu fólkini ið luttóku skikkaðu sær sera væl. Hetta er eitt tiltak, ið er fyri tey ungu í ongastaðni hava at fara um kvøldarnar í vikuskiftinum. Margarinfabrikkin í Havn og Tórshavnar kommuna standa aftan fyri tiltakið. Tað er eitt krav fyri at sleppa inn, at tú ikki er sjónliga ávirkaður.

# Vit vilja ikki verða verri fyri

**Ein av teimum mongu studentaskúlanæmingunum, sum í dag var við í mótmælisgongu niðan í mentamálaráðið, var Annika Vang úr Suðuroy. Hon sigur, at teirra árgangur ikki vil verða verri fyrin, enn teir ið hava verið undan teimum**

STUDENTAMÓTMÆLI
*Terji Nielsen*
terji@sosialurin.fo




*Næmingarnir finna seg ikki í at lestrarfrítíðin er tikin av*

*Mynd: Jens K. Vang*

Hundraðtals ungdómar, sum í ár ganga í 3.g. á studentaskúlunum kring landið, gingu fyrrapartin í dag í mótmælisgongu niðan á mentamálaráðið, har tey vístu landsstýrismanninum, Jógvani á Lakjuni, sína ónøgd við, at lesifrítíðin undan próvtøkunum komandi summar verður skerd. Ætlanin hjá mentamálaráðnum er annars at javnstilla allar miðnámsútbúgvingar, tá ið tað snýr seg um lesifrí, men hesum mótmæla studentaskúlanæmingarnir harðliga.

### Týdningarmikið at hava góðar lesimøguleikar

Annika Vang, sum gongur í 3.g. á miðnámsskúlanum í Vági, sigur, at tey als ikki kunnu góðtaka, at lesifrítíðin verður skerd.

- Tað er ómetaliga týdningarmikið at hava so góðar møguleikar sum gjørligt at lesa undan eini próvtøku, soleiðis at vit fáa eitt so gott úrslit sum gjørligt. Tað er eisini vert at hugsa um, at tey, ið hava tikið prógv árini undan okkum, hava havt munagóða lesifrítíð. Hetta eru tey, sum vit skulu kappast við um plássini á hægru lærustovnunum, og um okkara lesifrítíð verður skerd, so ger tað okkum veikari í mun til tey, sum hava gingið árini á studentaskúla árini undan okkum, sigur Annika Vang.

Hon heldur eisini, at tað ikki ber til at samanbera til dømis hægri handilsskúla útbúgvingina og studentaskúlaútbúgvingina, tá ið tað snýr seg um lesifrí.

- Hægri Handilsskúli er ein tvey-ára útbúgving, meðan student er ein trýára útbúgving. Um vit hava somu lesifrítíð, so merkir tað í veruleikanum, at HH-næmingarnir hava somu tíð at lesa eitt tvey ára pensum, sum vit hava til eitt trý ára pensum, og tað er ikki heilt rættvíst, heldur Annika Vang.

Mentamálaráðið ætlar eisini, at studentaskúlarnir næmingarnir undan komandi próvtøkum ikki fáa at vita, hvørjar munnligar próvtøkur tey skulu til, fyrr enn tey hava verið til teir skrivligu. Hesum átala næmingarnir harðliga, tí tey vilja hava best hugsandi møguleikar at lesa upp á pensum, og tí tey, sum áðurnevnt, ikki vilja verða verri fyri, enn tey sum hava gingið undan teimum, greiðir Annika Vang frá.

Annika Vang fegnaðist tó um, at Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, hevði sagt næmingunum frá, at hann fór at endurskoða málið, tí sum lærari sjálvur skilti hann væl støðuna hjá næmingunum.



*Landsstýrismaðurin ætlar sær at hyggja nærri at málinum*

*Mynd: Jens K. Vang*

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður:

# - Fari at hyggja nærri at málinum

**Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, hevði í morgun vitjan av hundraðtals studentaskúlanæmingum, sum vístu sína ónøgd við, at mentamálaráðið ætlar at broyta lesifrítíðina hjá teimum undan komandi skúlaári, og at tey seinni enn vanligt fáa at vita, hvørjar munnligar próvtøkur tey skulu til.**

STUDENTAMÓTMÆLI
*Terji Nielsen*
terji@sosialurin.fo

Jógvan á Lakjuni fekk herfyri skriv frá næmingunum úr Hoydølum, har tey kærdu sína neyð víðvíkjandi ætlaðu broytingunum í sambandi við próvtøkurnar, og í dag fekk hann so skriv frá næmingunum á miðnámsskúlanum í Suðuroy handað í sambandi við mótmælisgonguna.

### Kenni væl støðuna

Sjálvur hevur Jógvan á Lakjuni nógv ár á baki sum lærari, og hann kennir tí væl støðuna, sum næmingarnir eru í.

- Á ein hátt so skilji eg tey væl, og eg eri ikki í iva um, at tað eru bæði næmingar og lærarar, ið harmast, at tey ikki fáa munnligu próvtøkurnar at vita, fyrr enn tær skrivligu eru farnar aftur um bak. Áður hava tey jú fingið at vita undan skrivligu próvtøkunum, hvørjar munnligar tey skulu til. Tað er jú tað, sum er høvuðsmálið í hesi ósemjuni, sigur Jógvan á Lakjuni.

Landsstýrismaðurin greiðir frá, at sjálvur hevur hann als ikki verið við í hesum avgerðum, ið eru tiknar, tí tað er umsitingin, sum hevur tikið sær av málinum, og umsitingin hevur mett tað rættast, at miðnámsútbúgvingarnar verða so javnt stillaðar sum møguligt.

- Eg havi lovað næmingunum, at eg fari at seta meg inn í málið og hyggja nærri at tí. Hetta fari eg at gera saman við umsitingini, men tað verður neyvan nakað nýtt at frætta í hesi vikuni, tí onkur av starvsfólkunum, ið hava við málið at gera, er uttanlanda. Eg vænti tó, at vit fara at viðgera málið í komandi viku, sigur Jógvan á Lakjuni.